

*Blair saman við bretskum hermonnum í Kosova*

tilgongdin fram ímóti fólkaræði formliga heldur fram, er landið alt í dag ein stórur ruðuleiki, mest at líkna við eitt stórt brotsmannabøli, har sjálvt ikki djarvastu blaðfólk vága sær út um skansar og vard økir. Men sjálvsagt er møguleiki fyri, at myndin kann broytast.

## Samleikakortini

Sum longu umrøtt, legði Tony Blair frá landi við eini ætlan um at nútímansgera Labour og geva flokkinum eitt meira smidligt og liberalt andlit. Tað er tí lagnunnar speisemi, at nettupp hansara stjórn - sum ein avleiðing av tí vaksandi yvirganginum í heiminum - hevur hert um ríkisins tak á tí einstaka.

Eitt dømi um hetta er tað, at myndugleikarnir nú kunnu lata fólk fongsla í long tíðarskeið, uttan at tey koma fyri ein dómara. Hetta er brot á ta gitnu ensku *habeas corpus*-lógina frá 1679, eina av fólkaræðisins høvuðssúlum.

Eitt annað dømi er ætlanin hjá Blair-stjórnini um at tvinga landsins borgarar til at brúka samleikakort, har upplýsingar um alskyns persónlig viðurskiftir, t.d. eisini eins arvafrøðiliga lykil, eru varðveittar, og - undir vissum treytum - kunnu latast løgreglu, skatta- og tollvaldi, umsiting osfr. Endamálið við hesum ID-kortum er at minka um yvirgang, skattasvik, svart arbeiði osfr.

Mótstøðan móti hesi ætlan tykist vera rættiliga stór og hevur undirtøku í parti av Labours vinstravongi. Víst verður á, at møguleikin fyri misbrúki er stórur, og at brotsmenn lættliga fara at kunna skáka sær uttan um eina slíka skipan. Men fyrst og fremst verður ætlanin hildin at vera ein atsókn móti borgarans persónliga frælsi.

Í triðja og seinasta parti av hesi greinarøð verður m.a. hugt at, hvat Blair-stjórnin hevur avrikað á heilsu- og útbúgvingarøkinum. Greitt verður frá teimum framstigum, sum eru hend í Norðurírlandi, og frá ætlanini hjá Roy Jenkins um at demokratisera ta ensku valskipanina - ein ætlan, sum Blair eina tíð tók undir við, men sum seinni varð av ongum.

hann orðaði tey í síni gitnu Chicago-røðu í 1999.

Í sínum samstarvi við Bush og USA gjørdi Tony Blair alt hann var mentur fyri ikki at verða sæddur sum tann eitt sindur láturliga eltibløðran. Blair royndi at geva amerikanarum mótspæl og tengdi tríggjar treytir at sínum stuðuli til USA: (1) at friðartilgongdin í Miðeystri skuldi halda fram og verða ment, so palestinar ikki vóru við sviðið soð, (2) at samgongan móti Irak skuldi vera so breið sum gjørligt og (3) at kríggj og onnur tiltøk skuldu verða framd í samstarvi við ST. Tað var honum eisini um at gera, at samgongan sá til, at eitt eftir-saddamskt Irak varð vandaliga røkt, fekk líkindir, hjálp og stuðul til at gerast eitt veruligt fólkaræði.

## Blair við undirlutan

Sum heild tykist Tony Blair at hava verið við undirlutan í hesum dysti. USA hevur, sum eisini væntandi var, gjørt lítið fyri at stuðla palestinum og teirra ynskjum. Samgongan móti Saddam gjørdist sera smøl, ein útgangur, sum bæði kom av, at lond sum Týskland og Frakland vóru ímóti kríggi, og av tí sannroynd, at nýafturhaldið ikki var hugað fyri einum slíkum samstarvi. Kríggið var skrumblað ígjøgnum, við lítlari og ongari fyrireiking, ofta púra uttan fyrilit, og líkindini til at reisa landið aftaná vóru (og eru) av somu orsøk ikki góð.

Tony Blair var við øðrum orðum helst ov bláoygdur. Orsøkina til hansara mistak finna vit í tí veruleika, at Bush-stjórnin gekk í tveimum. Dúgvur sum Colin Powell, sum Blair valdi at halda seg til, taptu maktstríðið í Washington. Heykar sum Dick Cheney og Donald Rumsfeld, sum vildu ganga politiska og hernaðarliga einagongu, fingu sín vilja. Sfinxurin Bush sveimaði onkustaðni í erva, men endaði við at fylgja sínum hjarta og heykunum.

Irak er størsta avbjóðing, Tony Blair sum ríkisovasti hevur baksast við. Og útgangurin á hesum máli fer helst at hava avgerandi ávirkan á hansara politiska umdømi. Enn er sjálvsagt ógjørligt at døma um hetta. Tann altíð bjartskygdi Blair droymir ivaleyst um, at grønt gras og leskiligar lundir fara at grógva, har Saddam sáddi óndskap, plágaði fólkið við ræðuligum pínslum og legði eftir seg gaddajørð.

Hóast allar royndir hjá serliga høgravendum blaðfólkum at fríðka um avleiðingarnar, sær í dag svart út í Irak. O.u. 100.000 irakar eru, sambært summum keldum, falnir orsakað av krígnum og tess fylgjum. Hvønn mána doyggja 500-1000 fólk av sjálvmorðsatsóknum. Og hóast



*Tveir lagsbrøður í Hvítu Húsunum í juli 2003. Blair stuðlaði Bush, men fekk ikki fullan valuta fyri stuðulin*